## DAGSINS MEINING

# Eitt stig móti fólkaræði

Sunnudagin var so tað nógv umrødda valið í Irak hildið. Sum væntað var nógvur harðskapur valdagin tó at nógvir eygleiðarar høvdu roknið við nógv meira harðskapi og ófriði. Valdagur kostaði 36 fólkum lívi. Tað hevur verið stórur ivi í altjóðasamfelagnum eins væl og í sjálvum Irak, hvørt tað nú var skilagott, at taka valið her og nú. USA, sum er tann, ið situr við veruliga politiska valdinum í Irak, hevur tó hildið fast við upprunaliga ásetta dagin og hevur so trýst fyribilsstjórnina til at halda fast við henda ásetta dag.

Tað er ein stórur spuringur, hvussu frælst og frítt hetta val er. Á pappírinum lýkur valið leygardagin í Irak øll krøv til eitt demokratiskt val. Hinvegin hevur politiska ósemjan framman undan valinum verið so stór, at ein stórur og sera týðandi átrúnaðarligur partur, Sunni muslimarnir, fyri ein stóran part hava boykottað valið. Flokkar við tilknýti til Sunni muslimska umhvørvið stilladu ikki upp. Hetta er so avgjørt tað veikasta liðið í demokratisku tilgongdini. Hetta merkir jú, at ein stórur og máttmikil samfelagsbólkur tekur ikki medábyrgd av nýggju demokratisku skipanini og fær onga umboðan í nýggja tjóðartinginum. Hetta er sera stórt spell og hetta viknar um nýggju skipanina, sum frammanundan stendur á veikari grund. Eisini merkir hetta, at tað stýrið, sum kemur burturúr valinum noyðist at líta á amerikanska hermegi langt fram í tíðina. Hetta er ikki eitt hugaligt perspektiv í muslimskum landi.

Heimssamfelagið hevur sum heild tikið væl í móti valinum. Kofi Annan, ST aðalskrivari, rósti í gjár irakisku veljarunum fyri stórt dirvi og fyri at hava tikið ábyrgd av demokratisku tilgongdini. Hetta merkir, at ST viðurkennir sjálvt valið sum eitt demokratiskt val og at ST fer at viðurkenna úrslitið, tá hetta verður alment um einar 7 dagar. Uttan mun til, um einum dámar innrásina í Irak og tað kríggj, ið hon elvdi til, so eiga øll demokratiskt sinnað fólk at fegnast um sjálvt valið, ið er tað fyrsta val í Irak í fimti ár. Valið er, alt annað líka, eitt stig móti fólkaræði í Irak. Tað er ikki givið, at USA og Bretland fara at fegnast um sjálvt úrslitið. Men tað gerst ikki við. Nú má vesturheimurin virða sínar egnu spælireglur og samstarva við ta stjórn, ið kemur burturúr valinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nú er at hyggja frameftir!

**Elin Heðinsdóttir Joensen**
*fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*



VAL05

Fólkatingsvalið 8. februar eigur at verða ein uppgerð við ta vanahugsan, ið hevur merkt síðsta valskeið við tveimum ósamdum føroyskum umboðum á fólkatingi, ið hava dyrkað heimligar ósemjur, heldur enn at vera røddir fyri allar føroyingar.

Neyðugt er við einari nýggjari rødd á fólkatingi, ið umboðar allar føroyingar og breitt samstarv. Stríð og spjaðing hoyra ikki heima í føroysku fólkatingsumboðanini, og hetta vil eg fegin gera upp við! Okkum tørvar nýhugsan heldur enn stillstøðu.

Skulu vit fáa nakað burtur úr okkara umboðan, er neyðugt at hava fólkatingsumboð, ið kenna sín leiklut, sum snøgt sagt er at vera bindilið millum Føroyar og Danmark. Tí er tað neyðugt, at Javnaðarflokkurin vinnur eitt umboð, sum fer á fólkating at røkja føroysk áhugamál.

Vit eiga at liva í tí politiska veruleikanum, sum til eina og hvørja tíð er galdandi. Tað ger Javnaðarflokkurin, so tí er ein atkvøða fyri lista C ein atkvøða fyri realpolitikki á fólkatingi, ið hvørki byggir á dreymar ella afturhald, men á teir møguleikar, okkara umboðan á fólkatingi gevur.

Tí hevur tað veruliga stóran týdning, at tú velur eina rødd á fólkating, ið er før fyri at umboða føroyingar á virðiligan hátt, so ávirkan fæst á øll tey mál, sum eru okkum viðkomandi. Tað er tað, tað snýr seg um, og eingin ger tað betur enn eitt væl valt Javnaðarumboð!

# Fólkatingsumboð og ambassadørur

**Ein fólkatingslimur eigur í mínum huga ikki bert at taka sær av politiskum málum millum Føroyar og Danmark. Tað er neyðugt, at hann eisini brúkar embætið sum eitt portur út í heim. At hann skapar sambond og samstarvsmøguleikar fyri millum annað føroyskt vinnulív, mentan, gransking og nýskapan**



VAL05

**John Johannessen**
*Fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*

At arbeiða fyri einari betri avtalu um sjálvstýri, uttanríkispolitiskum heimildum og harvið størri avgerðarrætti til føroyskar myndugleikar er sjálvsagt ein stór uppgáva, sum eitt føroyskt umboð á fólkatingi skal leggja stórt arbeiði í.

Men eg eri sannførdur um, at umboðanin í danska tinginum eisini skal fatast sum ein onnur avbjóðing. Sum føroyingur á Fólkatingi hevði eg eisini valt at átikið mær eitt slag av umboðsmannaleikluti fyri føroysk áhugamál úti í heimi. Á Christiansborg ert tú eitt fet nærri evopeiska meginlandinum, og kemur lætt í samband við fólk, sum hava stóra ávirkan í evropeiskum høpi.

Havið hevur tú ein øktan møguleika millum annað at umboða føroyskt vinnulív og at skapa samstarv og samvinnu. Samstarv og samvinna eru ógvuliga týdningarmikil, nú vit við vaksandi arbeiðsloysi merkja á okkara egna kroppi, at økta alheimsgerðin minkar um føroyska kappingarførið. Tú kanst ikki vera nøgdur við at hyggja at alheimsgerðini. Tað er neyðugt á ein ella annan hátt at leypa við upp á vognin.

Eg eri sannførdur um, at bert tú teg rætt at, ber væl til at fáa í lag okkurt slag av sunnari samvinnu bæði við danir og onnur lond, sum kann styrkja føroysku vinnuna og harvið búskapin.

Eitt nú haldi eg, at tað hevði borið væl til at fingið í lag eitt økt granskingarsamstarv á sunnum grundarlag. Fyrst við Danmark. Síðani við umheimin. Danmark er á odda innan gransking og nýskapan. Tað hevði ivaleyst verið eitt gott hugskot at útbyggt granskingarsamstarvið millum føroyskar og danskar granskarar og millum føroyskar og danskar granskingarstovnar. Danir eru høgt viðurkendir í altjóða granskingarhøpi og samstarva á høgum støði við umheimin innan økið. Eg eri vísir í, at skapa vit eitt tætt granskingar- og menningarsamstarv við danir, skapa vit harvið eitt økt granskingar- og menningarsamstarv við heimssamfelagið.

Soleiðis mynda vit framtíðar Føroyar.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.